LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Blandimeistari til asfaltverkið í Hundsarabotni

Við tað at ov fáir umsøkjarar vóru, verður við hesum søkt av nýggjum eftir blandimeistara til Hundsarabotn.

Arbeiðið fevnir um at framleiða asfalt við plc-stýrdari útgerð og viðlíkahald av verkinum.

Umsøkjari við í minsta lagi útbúgving sum maskinsmiður, elektrikari ella líknandi hevur fyrimun.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avvarðandi sáttmála.

Skrivlig umsókn verður at senda Landsverkfrøðinginum, postboks 78, 110 Tórshavn, innan 25. apríl 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jólsvein Joensen, verkfr. á tlf. 311333/223050 ella formannin í Hundsarabotni, Friðjón Jacobsen, á tlf. 421049.

**LANDSVERKFRØÐINGURIN**

## søkir eftir avloysarum til Pylsuvognin á Vaglinum

Gerandisdagar ella vikuskiftir.

Møguleiki er fyri at hava skiftandi arbeiðstíð, og eisini frídagar.

Pylsuvognurin hevur opið allar dagar í vikuni, frá 17.00 til 00.30

**Førleikakrøv:**

- Áhuga og royndir í at arbeiða innan sama ella líknandi økið
- Ert álítandi, fyrikomandi og sjálvstøðugur

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. apríl og skulu sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Boks 301
110 Tórshavn

Hús í Íslandi til leigu
Gisting í Rangárþingi
HELLIRINN ÆGISSÍÐU v/HELLU
Hús: S:8683677
76m², 4 herb., eldhúsaðstaða.
25 m², eldhúsaðstaða.
Sími: 487 5871



# KUNNGERÐ
## til løgtingsveljarar í Runavíkar kommunu til løgtingsvalið 30. apríl 2002

**Brævatkvøður**
Veljarar í Runavíkar kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 29. apríl 2002.

**Valkort**
Við hesum verður gjørt kunngjort, at til løgtingsvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt býráðsskrivstovuni frá í seinasta lagi 29. apríl 2002 á tlf. 417000.

**Valstaðið**
Løgtingsvalið fyri valstaðið í Runavíkar kommunu fer fram í Ítróttarhøllini í Runavík fyri bygdirnar:

*Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará, Runavík, Rituvík og Æðuvík.*

Atkvøðugreiðslan byrja kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00 – ***ella so leingi veljarar møta uttan steðg.***

RUNAVÍKAR KOMMUNA

**Runavíkar býráð**
Heiðavegur
600 Saltangará

# Summarferiu-avloysari

Føroya Shell søkir eftir feriuavloysara summarið 2002 til bókhaldsdeildina á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

Arbeiðið fevnir um avgreiðslu av viðskiftafólki og annað fyrisitingararbeiði. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á telefon 347400 lokal 413.

Umsókn merkt »avloysari« skal sendast til

Shell

**P/F Føroya Shell**
Postboks 188
110 Tórshavn

og má vera okkum í hendi innan 1. mai 2002.

# Gólváleggjari

Vit sóknast eftir gólváleggjara til gólvdeildina í Vøruhúsinum á Hjalla.

Nærri upplýsingar á tlf. 342500 ella 216755, Sólbjørn.

Skrivlig umsókn innan 25. apríl verður at senda til:

LITAVAL P/F
Postboks 1019
110 Tórshavn
E-mail: st@litaval.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Hjálparfólk
## í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla og Tórshavnar Lista- og Musikkskúla

Eitt starv sum hjálparfólk í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla og Tórshavnar Lista- og Musikkskúla verður lýst til setanar 1. juli 2002.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at taka sær av frítíðarundirvísingini í kommununi í samráð við og undir eftirliti skúlaleiðarans.

**Førleikakrøv**
Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, undirvísingar- og umsitingarligar royndir og dyggur kunnleiki til føroyska skúlaverkið. Harumframt krevst hollur kunnleiki í føroyskum og góð samstarvsevni, eins og fíggjarligt innlit og góður teldukunnleiki er av stórum týdningi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett fyri eitt 3 ára skeið í senn. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið frá Napoleon Nólsoy, skúlaleiðara, tlf. 317755 ella Jákupi Simonsen, deildarleiðara í trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi týsdagin 14. mai 2002.

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**
er frítíðarskúli undir býráðnum, og er eitt tilboð til borgaran um fjølbroytta undirvísing eftir arbeiðstíð. Skúlin bjóðar eisini dugnaskaparroynd í sigling og motorlæru, maritimt fyrireikingarskeið, royndarfyrireikandi undirvísing í 9. 10. flokki umframt bú- og roknskaparlæru.

**Tórshavnar Listaskúli**
bjóðar frálæru í grafikki, leirarbeiði, tekning og máling.

**Tórshavnar Musikkskúli**
hevur til endamáls at vekja ans fyri tónlist, menna musikalsku gávur næminganna og leggja støði undir eitt ríkt musikklív. Skúlaárið 2002/03 verða umleið 3.600 næmingar og 175 lærarar í hesum skúlum.

SNARSKIVAN

# Sølufólk

Vit sóknast eftir fólki til málingadeildina í Vøruhúsinum á Hjalla.

Arbeiði umfatar avgreiðslu av kundum og annað fyrifallandi arbeiði.

Nærri upplýsingar á tlf. 342500, Birgir.

Skrivlig umsókn innan 25. apríl verður at senda til:

LITAVAL P/F
Postboks 1019
110 Tórshavn
E-mail: bav@litaval.fo



# Pedagogar til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir 1 pedagogi til stovu við 12 børnum í forskúlaaldri 6-7 ára gomul, at byrja 1. juni 2002 ella eftir nærri avtalu.

Eisini verður søkt eftir 1 pedagogi til vøggustovuna, at byrja 1. august 2002.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvsognarstovnur. Á stovninum ganga 72 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.

Á stovninum eru fýra barnagarðstovur og tvær vøggustovur, har tann eina barnagarðsstovan er ein serstova har vit samskipa deyv og tunghoyrd og hoyrandi børn.

Á hvørjari stovu ganga 12 børn.

Vøggustovan hevur tætt samstarv við serstovuna, og má viðkomandi hava áhuga í hesum serøki.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum og foreldrunum, har tey kunnu trívast og menna st.

Somuleiðis, at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðariútvikling av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kann tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara á tlf. 319019 ella 219019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 11. mai 2002.

Klaksvíkar Sjúkrahús
Deild A + M

# Sjúkrasystrar og Heilsuatstøðingar / Sjúkrahjálparar

Søkt verður eftir feriuavloysarum í tíðarskeiðinum 16. juni til 15. august. Deildirnar verða samanlagdar frá 1. juli til 15. august.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn saman við prógvi og autorisatión verður sent til: Umsjónarmaðurin, Klaksvíkar Sjúkrahús, FO-700 Klaksvík.

Nærri fæst at vita um størvini frá:
Synnøvu Hansen, deildarsjúkrasystir, deild M, tlf. 455463, lokal 403 ella teldupost kssyn@ahs.fo

ella

Anna Løwe Sørensen, deildarsjúkrasystir, deild A, tlf. 455463 lokal 519 ella teldupost ksanlo@ahs.fo

ella

Jona Nielsen, fyristøðukvinna
tlf. 455463 lokal 106 ella teldupost ksjona@ahs.fo

Umsóknarfreist: 15. mai 2002.

Sosialurin -har tað hendir

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir tveimum starvsfólkum til Frítíðarskúlan í Kollafirði.

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv 25 tímar um vikuna og eitt hjálparfólkastarv 25 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Í Frítíðarskúlanum í Kollafirði, sum heldur til í Skótahúsinum ganga 25 børn. Karmarnir eru góðir. Økið rundan um er barnavinarligt og stutt er í fjøru og haga.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran og ítróttur hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing fyri tí einstaka barninum. At tú ert førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúla, og at tú tímir at vera saman við børnunum bæði úti og inni.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 6. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya landsstýri

**Meiri fæst at vita**
um størvini hjá Maluni Jógvansdóttir, leiðara, tlf.42 13 23 ella Katrini Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Frítíðarskúlanum í Kollafirði í hendi í seinasta lagi 1. juni 2002.

SNARSKIVAN

# Kunngerð
## um løgtingsval í Fuglafjarðar kommunu

Til veljarar til løgtingsvalið 30. apríl 2002 í Fuglafjarðar kommunu.

Atkvøðugreiðslan fer fram í býráðssalinum týsdagin 30. apríl 2002 fyri bygdirnar Fuglafjørður og Kambsdal, og í húsunum hjá Annu Jensen fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 10.00 og 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð. Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima við at venda sær til býráðsskrivstovuna **tlf. 444006** innan kl. 15.00 tann 29. apríl 2002.

Seinasti dagur fyri brævaatkvøður er **mánadagin 29. apríl 2002.**

Fuglafjørður, tann 17. apríl 2002.
**Fuglafjarðar býráð**

Valið er títt!
Lat børnini liva!
Vel eitt valevni, ið velur lívið!
www.provita.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Brúktur BMW 316i
bilurin er sum nýggjur




BMW 316i E36
Árg. 03/95 Km. 45.900 Metal Gráur
Útgjald bert 32.000,- / 158.000,-
Ein eigari, er sum nýggjur.
+Alu-felgur 16.000,-
Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo